## Alt er farið upp

Heilsuhjálparafelag Føroya hevur fingið nýggjan tvey ára sáttmála, sum hevur gildi frá 1. januar í 2004 til 1. januar í 2006. Nýggi sáttmálin við Fíggjarmálaráðið varð fingið í lag mánadagin og varð undirskrivaður seinnapartin týsdagin.

– Vit eru rættiliga væl nøgd við nýggja sáttmálan. Vit eru bæði væl nøgd við lønarhækkingina og semjuna sum heild, tí vit hava fingið rættiliga stórar broytingar í sjálvum sáttmálanum, sigur Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelagi Føroya.

Sáttmálin ber millum annað í sær, at lønin hækkar 6,43 %, og at eftirlønin skal verða 9 % frá 1. januar 2005. Frá 1. juni í ár hækka heilsuhjálparar eitt stig. Harumframt eru broytingar komnar í sjálvan sáttmálatekstin.

– Til dømis tá vit hava arbeitt 40 tímar í kvøldella náttarvakt, so fáa vit 3 tímar í avspáking, sigur Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelagnum.

Ása leggur afturat, at hon er ikki ónøgd við nakað í nýggja sáttmálanum, tí "alt er farið upp."

**hkm**

## Heilsuhjálpin 25 ár

Mikudagin 26. mai fyllir Heilsuhjálparafelag Føroya 25 ár. Í tí sambandi verður skipað fyri móttøku í húsum felagsins í Fríðrik Petersens gøtu nummar 7. Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelagi Føroya, sigur, at húsið er opið frá klokkan 14 til klokkan 19 í dag, mikudagin.

**hkm**

## Lívligur pardansur á skránni



Salsa stendur ovast á skránni hjá náttklubbanum Platform um vikuskiftið 4. til 6. juni. Salsa er ein lívligur kubanskur pardansur, sum er væl umtóktur í londunum kring okkum, eitt nú í Danmark.

Endamálið við tiltakinum er at "birta upp undir ein líknandi salsa-fepur í Føroyum." Við tí fyri eyga koma tveir undirvísarar í salsa til Føroya á vitjan, og skulu tey halda ein workskop, har fólk kunnu læra at dansa salsa. Undirvísararnir eru tey bæði Sara í Dali Hedeland og Anh Duy Nguyen, sum til dagligt takast við salsa í Keypmannahavn.

Tvey skeið verða hildin um vikuskiftið 4. til 6. juni í Platformi. Fyrra verður leygardagin frá klokkan 15 til klokkan 18, og seinna skeiðið verður sunnudagin somu tíð.

Umframt tað verður fríggjakvøldið 4. juni bjóðað inn á Platform, har salsakvøld verður fyri øll áhugaði. Tað verður ókeypis atgongd fyri miðnátt hetta fríggjakvøldið, sum eisini er mentanarnátt í Tórshavn.

**hkm**

## Sexologur á Hafnia



Tveir fyrilestrar eru á skránni á Hotel Hafnia hósdagin tann 3. juni frá klokkan 15 til klokkan 19. Bjarki á Rógvi Hansen, neurologur á Ríkissjúkrahúsinum, fer at tosa um epilepsi og kynslív hjá fólki við epilepsi, og hvørji árin heilivágurin hevur á tey. Hann fer eisini at røða um kost- og skurðviðgerðir.

Seinni fyrilesturin verður tann hjá Ellids Kristensen, sum er yvirlækni og sexologur á Ríkissjúkrahúsinum. Ellids fer at tosa um varandi brek við atliti til kynslívið.

Hesir báðir fyrilestrarnir eru ætlaðir øllum, ið hava áhuga fyri evninum, og øllum fólki við epilepsi, fólki í sjúkrahúsverkinum, fólki í heimarøktini og stuðulsfólkaskipanini, og pedagogum.

**hkm**

# Skeiva líkið kom

Leygardagin frættist, at líkvognur var farin úr Klaksvík til Havnar eftir kistu og líki í sambandi við jarðarferð. Men komin aftur til Klaksvíkar vísti tað seg, at kistan var tóm.

Og nú er aftur galið hjá sjúkrahúsunum. Portørar úr Klaksvík komu mánadagin til Havnar við einum líki, sum skuldi til líkskoðan. Teir koma til Havnar við bilinum, men tá teir lata upp, er tað annar maður, sum liggur í. Skeivt lík var komið til Havnar til líkskoðan. Hetta váttar vakthavandi á løgreglustøðini í Havn fyri Sosialinum.

Roynt varð tó at rætta mistakið sum best, og rætta líkið kom fram seinni um kvøldið.

– Eg vátti, at eitt mistak er hent. Leiðslan harmast um hendingina, og tískil mugu vit taka hendingina til eftirtektar og stramma upp í sambandi við líkflutning, sigur Heri Ellingsgaard, sjúkrahúsleiðari í Klaksvík.

Uni Vestureið av løgreglustøðini í Havn sigur, at líkskoðanin varð avgreidd týsmorgunin.

# Stór gáva til hornblástur



*Mikkjal Sørensen frá Suðuroyar Sparikassa handar Óla í Hjøllum, skúlastjóra í Vági, 50.000 krónur, sum skulu nýtast til keyp av messingljóðførum til Skúlaorkestrið í Vági. Handanin fór fram í Porkeri, tí tað verða næmingar í Porkeri, sum nú sleppa upp í part við nýggju ljóðførunum. Á myndini síggjast, umframt Mikkjal Sørensen og Óla í Hjøllum, Mannbjørn Olsen, Porkeris Skúli, tónleikalærararnir Jens Knudsen og Ulf Nordlund og leikandi næmingar*

**Suðuroyar Sparikassi hevur givið peningagávu áljóðandi 50.000 krónur til keyp av ljóðførum. Vágs Skúli fær peningin, sum er eyðmerktur til skúlaorkestrið í Vági og keyp av hornum, so orkestrið kann fáa fleiri leikarar og fyrst verða tað næmingar úr Porkeri, sum sleppa at blása við**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Musikkskúlin í Suðuroynni hevur eisini merkt, at tað ikki gongur framá búskaparliga í Føroyum. Men har fullu tey ikki í fátt og hava roynt ymsar leiðir at halda lív í tónleikalívinum millum tey heilt ungu í skúlaorkestrinum í Vágs Skúla. Síðsta árið hevur Ulf Nordlund verið tónleikalærari og leiðari fyri orkestrið og rættiliga væl er komið burturúr, tó komið ikki er á mál.

Søkt varð um stuðul ymsastaðir og Suðuroyar Sparikassi helt vera vert at stuðla sjónligu framgongdini innan tónleikalívið í økinum og sá týdningin í at fáa bygdirnar við. Týsdagin handaði Mikkjal Sørensen, stjóri í Suðuroyar Sparikassa, skúlastjóranum í Vági, Óla í Hjøllum, eina gávu áljóðandi 50.000 krónur. Peningurin er merktur til keyp av ljóðførum og verða tað í fyrstu syftu næmingar í Porkeris Skúla, sum sleppa upp í part við nýggju messingljóðførunum. Tí fór handanin fram í skúlanum í Porkeri.

Suðuroyar Sparikassi er vanur at stuðla ymsum tiltøkum, mentan og øðrum, men sjónligastur er hann helst sum høvuðsstuðul hjá VB. Nú er so lagt afturat innan stuðulsvirksemið og blómandi tónleikurin í økinum fær eitt herðaklapp. Við hesum kann sigast, at Suðuroyar Sparikassi roynir at fáa tað at grógva á nýggjum beitum og er tað hesaferð ikki graslíkisvøllur, ið er undirlendi.

# Deiggj spælir í Jelling

Sunnukvøldið fer føroyski rockbólkurin Deiggj at spæla á tónleikafestivali í Danmark. Hetta er fyrstu ferð, at bólkurin spælir á festivali uttanlands

Framførslan hjá Deiggj verður í Jelling sunnukvøldið, og har verður teir í selskapi við kend nøvn sum BB King, The Sandmen, Lars Lilholt og Patrick Iskasson.

Manningin í Deiggj hevur seinastu tíðina fyrireikað seg til danmarkarferðina, og teir, sum verða við bólkinum, á palli í Jelling, eru: Dennis Lave (sang), Pætur Dam (tangentar), Páll Lave (gittar), Fróði Vestergaard (sang og gittar), Sverri Heinesen (bass), Herluf Hermansen (trummur), og Emil Hermansen verðir ljóðteknikari.

Deiggj fer at spæla bæði heimagjørd og løg hjá øðrum á Jelling Festivalinum.

**-pop.fo**



# Trillubørin við høsnalorti bleiv ov tung

**Um stutta tíð verður djóralívið í Kollafirði eitt sindur ríkari, tí navnframi Johan í Kollafirði hevur keypt sær ein asna, ið skal lætta um arbeiðsbyrðuna hjá honum**

DJÓRALÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*





*Í næstum fær Johan í Kollafirði ein asna til landið. Hetta er tann fyrsti asnin í Føroyum, ið hvussu so er á fýra beinum, heldur skemtarin úr Kollafirði*

*savnsmyndir*

Hann hevur tað við at finna upp á okkurt, sum er eitt sindur øðrvísi, tann í Føroyum heimskendi Johan Dalsgaard ella Johan í Kollafirði, sum tey flestu rópa hann. Seinnu árini hevur Johan fingið sær høsnagarð nærheindis heiminum Frammi við Garðar í Kollafirði, og hetta er alsamt vorðið meiri umfatandi, soleiðis at Johan nú hevur bílagt sær ein hjálpara til høsnagarðin.

### Orkaði ikki at trilla trillubørina meira

Johan í Kollafirði greiðir frá, at tá ið hann herfyri varnaðist, at hann ikki longur orkaði at trilla trillubørina við høsnalorti, fekk hann eitt hugskot. – Eg hugsaði við mær sjálvum, at tað átti at verið upplagt at havt ein asna, sum kundu sleipa og dragsa fyri meg, greiðir Johan frá. Tískil gjørdi eg av at bíleggja mær ein slíkan, sigur Johan í Kollafirði.

– Eg setti meg framman fyri telduni eitt kvøldið, og á einari danskari leitisíðu skrivaði eg »æsel til salg«, og beinan vegin komu ein rúgva av úrslitum fram. So ringdi eg til tann, sum stóð fyrstur á listanum, og frá honum havi eg so keypt ein asna, so lætt var tað, greiðir Johan í Kollafirði frá.

– Í einari bók havi eg lisið, at ein asni passar seg sjálvan, bara hann hevur eitt skúr at verða, og eitt sindur av hoyggi, greinum ella ruski at eta, so tað passar mær ordiliga væl, sigur Johan í Kollafirði, sum eisini hevur lisið, at ein asni er sera væl egnaður hjá børnum at spæla við. Tó sigur Johan, at ætlanin hjá honum við asnanum er fyrst og fremst, at hann skal brúkast til at trilla vognar við ávíkavist eggum og tøð. – Lat meg beinan vegin gera vart við, at tað eru tveir ymiskir vognar, ið talan er um, sigur Johan í Kollafirði, sum sigur seg vænta, at tá ið fyrst hansara asni er komin, fara óteljandi føroyingar at eftirapa honum og keypa sær ein asna.

### Flutningurin dýrari enn asnin

Ein slíkur asni er sjálvsagt ikki ókeypis, men Johan í Kollafirði sigur, at asnin kostar einans 4.000 krónur, og tað er ikki so nógv, tá ið havt verður í huga, at hann er okkurt um fimm ár. – So seljarin av asnanum kann ikki vinna pengar upp á hann, tað eri eg vísur í, sigur Johan. Hann undrast tó á, at tað kostar meiri at fáa asnan fluttan til Føroya, enn tað kostar at keypa hann. Johan sigur, at hann noyðist at fara til Danmark við vogni eftir asnannum, og tískil skal hann hava ferðaseðil til bæði persón og vogn, umframt asnan, og tað ger, at flutningurin av asnanum til Føroya er kostnaðarmiklari enn sjálvt keypið av asnanum. – Men hetta havi eg ofta sæð fyrr, og til dømis bílegði eg mær eina bók á netinum herfyri, og hon kostaði 60 krónur at keypa, men postmaðurin fekk 70 krónur fyri at bera hana út til mín, og tað haldi eg er ordiliga umvent, sigur Johan í Kollafirði.

Av tí at asnin nú bráddliga gjørdist so kostnaðarmikil, kann tað verða, at hann verður eitt sindur seinkaður til landið, tí eg noyðist allarhelst út at fortelja fleiri vittigheitir og selja nógv egg, áðrenn eg havi pengar til at gjalda fyri fraktina, sigur Johan í Kollafirði.

Hvat ið tað næsta verður, ið Johan fer at útvega sær, dugir hann ikki at siga enn, men hann sigur tó, at hann hevur ein dreym um at hava eina ged, ein grís og ein asna og ganga og passa seg sjálvan. – Eg hevði tonkt mær at loyst frá Føroyum, og gjørt mær mín egna stat, akkurát sum Vatikanið í Rom kundi eg havt mítt Vatikan í Kollafirði, sigur Johan í Kollafirði, sum í næstum kann rópa seg asnaeigara.

TYRLUTÆNASTAN
HJÁ ATLANTIC AIRWAYS



Tyrluflúgvingin á Hvítusunnu

Flogið verður 2. Hvítusunnudag sum sunnudag.
Flogið verður ikki 1. Hvítusunnudag.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 60 · Faks 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo
www.atlantic.fo

NÁTTÚRUDEILDIN

MOLD FÍN 80L 79,95 · GRASFRÆ 74,95 · TRÝSTSPROYTARI 149,95 · PLENUREINS 119,95 · FORLEINGJARI 20 M 69,95 · DYGDAR SLANGA 199,00

ALT TIL HAVAN
STÓRT ÚRVAL AV ELEKTRISKUM OG BENSINDRIVNUM
TRIMMARUM OG PLENUKLIPPARUM




Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00